# Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs

***Týsdagin 17. september handaði Tórshavnar Býráð Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens:***

Oddvør Johansen *(fagrar)* „Tá ið eg havi málað summarhúsið“
Andras Mortensen *(yrkis)* „Hin føroyski róðrarbáturin“
og Kristian Blak fyri *mentanaravrik*

***og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs:***

Sólrún Michelsen fyri *barna- og ungdómsskaldskap* hennara






## Andras Mortensen

*Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir*

Andras hevur í ritgerð síni „Hin føroyski róðrarbáturin“ á dyggum søguvísindarligum grundarlagi greitt frá søguni um gamalt føroyskt bátasmíð, hvussu róðrarbáturin varð nýttur i dagligum yrki, og hvønn týdning hann hevði í føroyska samfelagnum.

Við greiðum skrivistíli og lýst við teimum neyvu tekningunum hjá Andrassi Joensen er hetta ein ritgerð, sum umframt at nøkta øll vísindalig krøv er áhugaverdur lesnaður hjá vanligum fólki.

Tað var í tøkum tíma, at hetta evnið, sum í øldir hevði avgerandi týdning fyri alt lív í Føroyum, varð tikið upp til søguvísindaliga viðgerð, og nevndin ivast ikki í, at Andras við hesi ritgerð hevur givið landsmonnum sínum eitt í allar mátar virðismikið og fyrimyndarligt verk.






## Oddvør Johansen

*Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir*

Í Skaldsøguni „Tá ið eg havi málað summarhúsið“ er rúsevnisvandamálið fyrstu ferð tikið upp í føroyskum bókmentum. Nortið verður við stórar spurningar sum kriminaliseringina av hassji, sum kann hava verri evnismisnýtslu og onnur lógarbrot við sær. Hetta evnið verður lýst innanífrá gjøgnum frásøgnina hjá tí unga Pedda. Lív hansara og tað hjá vinmonnum hansara eru dømisøgur um, hvussu hassj og onnur rúsevni kunnu skeikla lívsleiðina.

Evnisliga er bókin landnám í føroyskum bókmentum. Hon sigur frá búningarárunum hjá nøkrum dreingjum í einum avgerandi tíðarskeiði í Føroya søgu, 1990-árunum.

Hon setir á nøkur evni, ið tola neyvari viðgerð.






## Sólrún Michelsen

*Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs*

Fyri hennara barna- og ungdómsbøkur fekk Sólrún Michelsen Barnabóka virðisløn Tórshavnar Býráðs.

Sólrún hevur á livandi og løttum máli skrivað áhugaverdar, skemtiligar og spennandi søgur, sum børn og ung taka til sín. „Argjafrensar“ og „Útiløgukattar“ lýsa á sera fløvandi, skemtiligan og sannførandi hátt barna- og ungdómsár rihøvundans.

„Hin útvaldi“ og „Geislasteinar“ føra okkum inn í ein spennandi, hendingaríkan og hugtakandi ævintýrheim.

Sólrún Michelsen hevur við bókum sínum sýnt, at hon spennir víða, hevur hugflog og fjølbroyttar gávur.



## Kristian Blak

*Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens fyri mentanaravrik*

„Síðani hann kom til landið, hevur Kristian verið íbirtari, vegleiðari og luttakari í at kalla øllum tónleiki, frá fólkatónleiki, rytmiskum tónleiki til nýskrivaðan føroyskan partiturtónleik.

Lítillátin og ósjálvsøkin hevur hann saman við konu síni, Sharon, verið sálin í ótali av framførslum og framleiðslum, og verk teirra hevur víst okkum, hvønn týdning tað hevur tá fólk uttan úr heimi leitar til okkara og ríkar føroyska mentan.“

***Vit á Hestprent ynskja tillukku við virðislønunum og gleðast um, at vit hava verið partur av hesum útgávum.***

**HESTPRENT**

Dvørgastígur 7 · 110 Tórshavn · tel 314 555 · fax 318 026 · e-mail hestoy@hestprent.fo



# Nósi hoyrir ikki so væl

**Hetta sigur seks ára gamli Hans, sum gongur í Mylnuhúsinum í Klaksvík. Í góðveðrinum týsmorgunin vóru vit saman við barnagarðsbørnunum í Klaksvík í føðingardegi hjá Nósa**



*Nósi var vælumtóktur. Børnini sluppu øll framat at heilsa uppá Nósa og ynskja honum tillukku við teimum 12 árunum*

FØÐINGARDAGUR

*Anja Brekkstein & Sólrun Hansen, praktikantar*

Týsmorgunin, umleið klokkan hálvgum ellivu, vóru vit og vitjaðu Føroya Banka í Klaksvík. Tað sást beinanvegin, at her var okkurt serligt á vási. Í góð veðrinum uttanfyri bankan, stóðu fleiri ótolin barnagarðsbørn spent og bíðað u eftir, at Nósi skuldi koma út. Uttanfyri var prýtt við fløggum, og ymsastaðni runt í bankanum, var prýtt við ballónum.

Endiliga kom Nósi so út. Gleðin var stór, og børnini byrjaðu beinanvegin at syngja tillukku bæði á føroyskum og enskum, meðan tey dansaðu rundan um hann. Sum tíðin gekk, komu fleiri og fleiri barnagarðsbørn. Hesi dugdu eisini sera væl at syngja, og sungu tí føðingardagssangin umaftur. Tá liðugt var at syngja, bjóðaði Nósi øllum børnunum góðgæti og sunkist. Hetta fingu tey stóra gleði av, og settust at eta úti í frálíka veðrinum. Børnini vóru so mong í tali, at starvsfólk í bankanum fleiri ferðir máttu inn eftir meira góðgæti og sunkist.

Í ár fyllir Nósi 12 ár, og í tí sambandi bjóðar hann øllum børnum í føðingardag hjá sær. Sjálvt um Nósi bert var at síggja týsdagin í Klaksvík, vitjar hann eisini aðrar Føroya Banka-deildir runt í landinum. Mánadagin var hann millum annað og vitjaði á Norð skála og í Vági, og mikudagin var hann m.a. at síggja ymsastaðni runt í Havnini.

Øll børn kundu í síðstu viku koma inn í Føroya Banka við sparikistilinum, og seta pening á nósakontoina. Aftur fyri fáa tey eina spennandi gávu heim við .

– Hvørt ár, tá ið Nósi fyllir, bjóða vit barnagarðsbørnum og skúlabørnum í føðingardag. Tað er altíð ein spennandi vika, tá Nósi fyllir, og okkum dámar sera væl at fáa vitjan av børnum, sigur eitt av starvsfólkunum í Føroya Banka í Klaksvík.

Millum øll børnini, ið vóru til staðar, fingu vit okkum eitt prát við 6 ára gamla Hans. Hans gongur í barnagarðinum í Mylnuhúsinum, og hann greiddi okkum frá, at hann var sera spentur at møta Nósa. Sjálvt um hann helt, at Nósi ikki hoyrdi so væl, eydnaðist tað honum kortini at ynskja Nósa tillukku. Seinni ætlar hann sær at seta allan pengingin, ið hann hevur samlað, á nósakontoina, og hann gleðir seg at fáa eina gávu heim við.

– Eg haldi, at børnunum dámar sera væl at vitja Nósa. Tey hava glett seg nógv, og hava lært seg at syngja føðingardagssangin. Tað er stuttligt at síggja øll tey spentu børnini, og ikki minst, tá tey síggja tann sera væl dámda Nósa, sigur eitt av starvsfólkunum í barnagarðinum, Mylnuhúsið.

Føðingardagurin vardi í umleið ein tíma. Tá fóru øll børnini spákandi aftur til barnagarðin, bæði mett og væl sett.

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: argr@tv2bornholm.dk
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Heimurin gongur við sama lag

*Árni Gregersen, Bornholm*

Fyri einum ári síðani stóð allur heimurin á gosi. Terrorálopini í USA fekk okkum øll at hugsa um, at alt ikki er so trygt, sum vit annars hildu. Sjálvur var eg í Amsterdam tveir dagar eftir til stóra sjónvarpsframsýning. Har var hildin minningarløta inni í høllini, og tá ið eg skuldi heimaftur til Bornholm, vóru halarnir á Schipol flogvøllinum ógvusligir. Alt varð kannað og endavent.

Nú er so eitt ár liðið. Eg var til somu framsýning, men hesaferð var onki hóvasták. Onki var kannað og ongin minningarløta hildin.

Tað fekk meg at hugsa um, hvussu skjótt tíðarurið gongur, og hvussu skjótt vit gloyma. Kanska er tað gott, tí tað hevði ivaleyst verið tungt at liva, um vit skuldu minst alt.

Hetta vendi eg aftur til.

Á Bornholm var summarið og nú heystið brúkt til at fyrireika oynna til at gerast ein kommuna. Fólkaatkvøða var í fjør, og í mei valdu vit 27 fólk, sum 1. januar næsta ár skulu stýra oynni.

Tað er ikki sum at siga tað at leggja fimm kommunur og Bornholms Amt saman í eina stóra eind. Tað sigur seg kanska sjálvt. Kapping hevur til dømis altíð verið millum Rønne og næst størsta býin - Nexø. Nú skulu embætisfólk og politikarar finna saman og arbeiða meira fram móti heildarloysnum, sum skulu gagna allari oynni.

Avtala varð gjørd um, at hvør kommuna skuldi hava so ella so mangar krónur í kassanum 31. desember í ár, men tað tykist torført at halda hesar avtalur. Allar kommunurnar brúka pengar nú til at betra um júst teirra part av oynni áðrenn samanleggingina.

Summi ilskast inn á hesa mannagongd, meðan onnur halda at hetta ikki ger so nógv, tí verða pengarnir brúkt skilagott, so gagna teir Bornholm í øllum førum.

Dømi omanfyri vísir bert, at tað er torført at broyta og bróta upp úr nýggjum. Tað sum fyrr nevndist solidaritetur hevur ikki so høgan kurs longur. Vit halda, at vit hvør sær - tað veri seg fólk ella samfeløg - kunnu klára okkum einsamøll, men tað letur seg ikki gera.

Globaliseringin ger tað enn torførari. Vit mugu arbeiða saman á øllum økjum. Heimurin rullar so skjótt, at hvør einstakur - ella hvørt einstakt samfelag - ongan møguleika hevur at fylgja við. Skal nakað koma burturúr, er neyðugt at gera tað í felag við øðrum.

Hvussu samanhaldið fer at verða, tá ið Bornholm 1. januar verður ein eind, verður spennandi at síggja. Nógvir spurningar eru eftir at loysa. Ein er, hvussu myndugleikarnir kunnu tryggja, at eldrarøktin verður á sama støði á allari oynni - ella at barnaansingin verður eins. Hvussu skal stuðul latast til ítróttarfeløg ella ungdómsfeløg á smáplássunum? Fer ein stór kommuna yvirhøvur at hava áhuga í at smásamfeløgini framvegis liva?

Spurningarnir eru nógvir og embætismenn og politikarar arbeiða hart í hesum døgum fyri at fáa teir svaraðar. Einasta sum liggur heilt fast nú er, at eisini nýggja stórkommunan manglar pengar - og at eingin møguleiki er at fáa allar spurningar svaraðar áðrenn 1. januar. Tað ganga helst eini tvey-trý ár.

Aftur til byrjanina. Vit gloyma skjótt. Hóast stórt minningarhald var í USA herfyri, so hava amerikumenn helst gloymt sorgina. Nú er tað meira hevnd teir hugsa um. Teir gera seg til reiðar at leypa á Irak. Hvønn tað annars fer at raka hugsa teir helst ikki so nógv um - ella leggja onki í.

Jú - heimurin rullar við sama lag.

Og vit læra lítið og onki.